# Forsetin stóð fyri rættlestrinum

Tá bøkur verða skrivaðar, er eisini av stórum týdningi, at málsligi parturin er í lagi. Tað tykist hann eisini vera hjá teimum báðum, Johan Nielsen og Jógvan Martin Olsen, sum hava skriva Fótbóltur Framá, og í øllum førum skuldi rættlesturin av bókini verið í lagi. Tað er eingin annar enn FSF-forsetin, Óli Holm, sum hevur hjálpt til við rættlestrinum, so tann parturin av málinum skuldi verið í lagi. Óli er útbúgvin lærari, og tó at landafrøði er sergrein hansara, so hevur mál eisini havt hansara stóra áhuga ígjøgnum mong ár.




# Van der Sar heldur fram í Manchester

36 ára gamli málverjin hevur longt sáttmálan hjá sær við enska Manchester United við einum ári. Felagið hevur nærum havt støðugar málverjatrupulleikar, síðani danski Peter Schmeichel gavst í 1999, men teir trupulleikarnir tykjast loystir, eftir at royndi hollendingurin varð keyptur úr Fulham fyri 18 mánaðum síðani. – Edwin er væl fyri. Hann er framvegis svangur og eg rokni við, at hann væl og virðiliga kann spæla í tvey ár afturat, sigur venjarin hjá Manchester United, Sir Alex Ferguson.



*Á móttøkuni varð tikið til, at talan var um reint luksus, nú føroyskir venjarar høvdu eina føroyska bók sum íblástur til venjingar sínar. Í øllum førum er talan um eina serstakliga væl úr hondum greidda útgávu, sum Johan Nielsen og Jógvan Martin Olsen hava staðið fyri*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

bólkunum, umframt hópin av venjingum, sum kunnu vera við til at menna ymsu førleikarnar.

Og ikki minst, so setir bókin eisini krøv til venjarar. Ella rættari sagt, so peikiar hon á nakrar av eginleikunum, sum ein venjari helst skal hava innan ymsu aldursbólkarnar. Sosiala tilvitanin er jú púrasta ymisk, um tað eru 8- ella 18-ára gomul, sum eru partur av venjingini, og fyri trivnaðin – og harvið menningina - hjá spælarunum er hetta av ovurstórum týndingi.

– Tú kanst seta tær sjálvum spurningin, hvat tað er, sum vit ynskja okkara børnum. Fyrst og fremst, so vilja vit hava, at tey skulu trívast. Hartil sýna greiningar, sum eru gjørdar, at trivnaðurin og sosiali parturin fylla so sera nógv, tá tosað verður um orsøkir at spæla fótbólt, segði Jógvan Martin. Ein útsøgn, sum millum annað er grundað á kanningar hjá Pæturi Clementsen um orsøkir til fráfall frá fótbólti. Hendan sigur, at til samans 57% av fráfallunum stavast av, at venjingin ikki er stuttlig, ella at venjarin ikki er nóg góður.

## Ikki ævigur sannleiki

Tá tosað hevur verið um føroyska fótbóltsvenjing seinnu árini, so hava atfinningarnar ofta verið, at hendan í stóran mun er eitt avrit av danska fóbóltsskúlanum. Ivaleyst hevur DBU-venjaraútbúgvingin sín part av orsøkini fyri, at kritikkurin vendir tann vegin, men nærum av tilvild er hetta als ikki nakað, sum eyðkennir bókina.

– Tað hava vit slettis ikki hugsað um. Men í gjárkvøldið tosaðu eg og Jógvan Martin um hetta, og brádliga funnu vit útav, at av øllum tilfarinum í bókini, er einki sum helst tikið úr DBU-tilfari, segði Johan.

Og so legði hann afturat, at hann sum so ikki var so heitur fyri tosinum um ymsar fótbóltsmentanir.

– Tað kann sum so gera tað sama, um tú spælir fótbólt í Brasilia ella í Føroyum. Tingini, sum tú skalt duga á vøllinum, eru kortini tey somu. Og tað eru hesi ting, sum vit hava roynt at fingið við í bókina.

– Tá tað er sagt, so skal eg alt fyri eitt siga, at bókin ikki inniheldur alt um fótbólt. Har eru nógvir lutir, sum eg fegin hevði vilja havt við afturat. Bæði um taktiska og fysiska venjing. Men onkra staðni skal ein avmarking jú eisini vera. Bókin er fyrst og fremst ætlað at læra nakrar teknikkir at kalla. Tað ber jú ikki til at siga akkurát, hvussu hetta skal nýtast í dysti. Tá eru tað jú so nógv onnur viðurskifti, sum spæla inn, segði hann.

Tað kundi so bent á, at okkurt tilfar afturat kundi verið í væntu frá teimum báðum. Um hetta varð ikki sagt so nógv ítøkiligt, men tað man lítil ivi vera um, at vitanin hjá einum venjara sum Johan, er nóg stór til nógvar bøkur. At ein av hesum nú er givin út, er ein sonn gáva til føroyska fótbóltin, um hesin skal vinna framá.

## Fakta

Fótbóltur Framá, Frálæra í leikaramenning

**Rithøvundar:** Jógvan Martin Olsen & Johan Nielsen
**Útgevari:** Fótbóltssamband Føroya
**Layout og umbróting:** Cre8
**Prent:** arden+kommunik

**Støddd:** 201 síður
**Kostnaður:** 180 kr.
Bókin fæst til keyps í bókahandlum, FK og Shell-støðum kring landið



**Jógvan Martin Olsen, Toftir**
Føddur 1961
UEFA: A-license venjaraprógv
FSF: Venjara-instruktørur
Royndir sum venjari:
B68, LÍF, NSÍ (1993-2004)
U-venjari hjá FSF (1994-2003)
U-samskipari hjá FSF (1999-2005)
Hjálparvenjar, A-landsliðið (1996-2005)
A-landsliðsvenjari (2005-)
Kosin ársins venjari í 2002



**Johan Nielsen, Tórshavn**
**Føddur:** 1940
UEFA: A-license venjaraprógv
FSF: Venjara-instruktørur
Royndir sum venjari
HB, B36, GÍ, B68, Skála, NSÍ (1963-)
Venjari hjá U- og A-landsliðnum
Vunnið FM 10 ferðir
Vunnið steypakappingina 11 ferðir
Kosin ársins venjari í 2001 & 2004